## Brot úr Føroya søgu

Leygardagin 1. september skipar Landsskjalasavnið fyri ráðstevnini "Brot úr Føroya søgu". Tiltakið er skipað sum ein røð av fyrilestrum um ymisk evni úr føroyskari søgu. Felags fyri allar fyrilestrarnar er, at teir eru grundaðir á skjalarannsóknir, tvs. á skrivligar keldur úr skjalasøvnum. Fyrilestrarnir eru allir á føroyskum. Søga er frásøgnin um einstaku hendingina. Søga er eisini frágreiðing um orsøkir til hendingar ella um samanhang millum orsøk og hending. Felags fyri søgu er tó, at hon snýr seg um tað undanfarna, og er grundað á keldur um tað undanfarna, tað verið seg skrivligar, munnligar ella annað. Ráðstevnan "Brot úr Føroya søgu" er ætlað øllum, sum hava áhuga í føroyskari søgu. Tað er ókeypis at luttaka á ráðstevnuni, sum verður í Norðurlandahúsinum.

## Øll kunnu brúka savnið

Øll kunnu koma inn á Landsskjalasavnið og biðja um loyvi at síggja skjøl og seta spurningar. Sambært lóg um Landsskjalasavn ber til at fáa atgongd til skjøl, ið stovnar hava latið savninum, tá hesi eru 30 ára gomul. Stovnurin, ið avhendir, kann saman við Landsskjalasavninum, áseta eina longri atgeingisfreist, um serlig viðurskifti krevja hetta. Skjøl, sum innihalda privatar upplýsingar hjá einstaklingum, skulu vera 80 ára gomul, áðrenn vitjandi sleppa at síggja tey. Til ber tó at søkja um frávik frá hesum reglum, um upplýsingarnir skulu brúkast til gransking ella snúgva seg um egin viðurskiftið. Hvørt ár vitja eini 2500 fólk lesistovuna á Landsskjalasavninum. Størsti parturin eru fólk, sum fáast við ættargransking.

# hvørva vit



*- Í allari hesi framkomnu tøknini hava vit framvegis ongar telduskráir, ið eru líka støðugar, sum pappír, sigur Sámal Tróndur Jóhansen, landsskjalavørður*

persónurin er farin úr starvi, spyr landsskjalavørðurin.

### Tvørskurður av samfelagnum

Landsskjalasavnið hevur tó aðrar uppgávur um hendi enn KT varðveitslu. Í sambandi við 75 ára hátíðarhaldið verður millum annað ein framsýning av skjølum frá Kongaliga Einahandlinum, sum fyri stuttum vóru fingin heim til Føroyar úr Danmark. Sámal Tróndur Jóhansen fegnast um, at tað er eydnast at fáa hesi skjølini heim aftur. Hann ivast nevniliga ikki í, at skjølini frá Einahandlinum eru týdningarmesta einstaka føroyska savn frá 1800 talinum.

- Savnið er í grundini ein tvørskurður av føroyska samfelagnum og liviháttinum gjøgnum eitt langt tíðarskeið. Stórt sæð allir føroyingar frá tí tíðini eru skrásettir har, við tað at øll søla og alt keyp gekk gjøgnum Einahandilin, sigur landsskjalavørðurin.

Skjølini eru fyribils fyrsta úrslitið av eini sokallaðari prinsippavtalu millum føroyska Mentamálaráðið og danska Kulturministeriet um afturbering av skjølum, sum viðkoma ella hoyra heima í Føroyum.

Hendan avtalan fer at gera tað munandi lættari hjá søgufrøðingum og granskarum í Føroyum at fáa hendir á nógvum føroyskum skjølum. Hartil dylir landsskjalavørðurin ikki yvir, at avtalan hevur eitt týðandi symbolskt virði, við tað at hon letur upp fyri, at hópin av føroyskum skjølum nú verða at finna, har tey hoyra heima.